## Skatturin kann reka fólk úr Íslandi



Íslendska stjórnin eigur at ansa eftir, at hon ikki økir útreiðslurnar hjá fólki so nógv, at tey heldur velja at flyta av landinum enn at knossa undir teimum øktu byrðunum. Tað sigur hagfrøðingurin Benedikt Jóhannesson við Morgtunblaðið. Stjórnin hevur longu framt ymsar hækkingar og hevur boðað frá, at hon fer at hækka skattin hjá háinntøkum, og at hon fer at hækka avgjaldið á tubbaksvørum og rúsdrekka. Benedikt Jóhannesson sigur, at tá allar hækkingarnar eru komnar í gildi, fara tær at kosta einum hjúnum við tveimum børnum 90.000 íslendskar krónur eyka um mánaðin. Tað er so nógv, at tað kann fáa fleiri at flyta av landinum, sigur hann.

## Leggja sak ímóti Royal Greenland

Stjórnin í grønlendska fiski- og veiðimannafelagnum KNAPK vil vera við, at Royal Greenland hevur brotið høvuðsavtaluna millum partarnar við at stovna eitt nýtt fiskivinnufelag. Tí hevur KNAPK gjørt av at leggja málið fyri ein gerðarrætt, sigur grønlendska kringvarpið KNR. Í høvuðsavtaluni stendur, at partarnir skulu vísa atlit fyri hvør øðrum, og hesa regluna breyt Royal Greenland við at bjóða 11 limum í KNAPK at stovna eitt nýtt felag, sigur Leif Fontaine, formaður í fiski- og veiðimannafelagnum. Leif Fontaine leggur afturat, at tað nýggja felagið ger, at KNAPK missir pengar, tí limir fara í tað nýggja felagið.



# Skuldin hjá kommunum sanerast við ríkisveitingini

*Jaspur Vang, tingmaður fyri Sambandsflokkin, heldur, at tað eigur at verða ein partur av ætlaða kreppupakkanum hjá samgonguni, at ríkisveitingin verður tiðna aftur og at meirinntøkurnar verða markaðar til at sanera kommunuskuld við*

**Jaspur Vang, tingmaður fyri Sambandsflokkin, vil nú hava landsstýrið at samráðast við donsku stjórnina um at tiðna ríkisveitingina úr Danmark upp aftur so at hon hækkar og so skal meirinntøkan markast til at sanera kommunuskuld við**

KOMMUNUSKULD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal ein partur av donsku ríkisveitingini úr Danmark brúkast til at sanera skuldina hjá teimum ringast staddu kommunum í Føroyum við.

Tað heldur Jaspur Vang, tingmaður fyri Sambandsflokkin.

Hóast alt skuldi vera so loyniligt, er meiri og meiri likið út um ætlaða kreppupakkan hjá samgonguni, og tess meiri ið er likið út, tess fleiri hava meiningarnar um hann verið.

Eisini Jaspur Vang hevur sítt hugskot til kreppupakkan, serliga tann partin, sum umfatar vakstrarpakkan.

Hann vil nú hava landsstýrið at taka samráðingar upp við donsku stjórnina um at tiðna ríkisveitingina úr Danmark uppaftur.

Ríkisveitingin úr Danmark er eitt fast krónutal og hann verður sostatt ikki prístalsviðgjørdur. Men tingmaðurin fyri Sambandsflokkin vil nu hava blokkin tiðnaðan uppaftur, so at hann hereftir eisini verður prístalviðgjørdur.

Men tær inntøkur, sum landskassin so fær meiri í kassan, skulu markast til at sanera skuldina hjá teimum ringast staddu kommununum við.

### Fleiri fáa, men ongin missur

Hann sigur, at hetta er einasti mátin, sum tað ber til at sanera tær mest kreppuraktu kommunurnar, uttan at taka nakað frá øðrum.

Og tað heldur hann er eitt avgjørt pluss í hesum krepputíðum.

Hann heldur eisini, at júst kommunuskuldin er størsta forðingin fyri eini kommunusamanlegging.

- Kommunur, ið eru hampiliga væl fyri, vilja ikki leggja saman við kommunum, sum eru so tyngdar av skuld, at tá ið ein samanlegging er framd, ber ikki til at gera nakað sum helst, tí skuldin er so stór.

Nú landsstýrið hevur sett eina nevnd at kanna allan kommunubygnaðin, hevur tað eisini ligið í kortunum, at vit skulu ikki hava meiri enn einar sjey kommunur í Føroyum.

Í hesum sambandi hevur tað verið nevnt, at kommunurnar fáa høvi til at leggja saman sjálvbodnar, men tær, sum ikki finna út av tí, skulu leggjast saman við makt.

Men Jaspur Vang heldur, at tað ber ikki til at tvinga kommunur, sum eru hampiliga væl fyri, at leggja saman við kommunum, sum eru í botnleysari skuld, tí tað fer at binda kommunurnar á hond og fót.

Hann nevnir Suðuroy sum dømi.

- Har hava vit Hvalba og aðrar minni kommunur, sum eru so mikið væl fyri fíggjarliga, at tær hava eitt ávíst virkisfrælsi.

- Tað ber illa til at tvinga tær at leggja saman við Vági og Tvøroyri, sum eru so skuldarbundnar, at verður skuldin ikki sanerað, fær tann samanlagda kommunan at kalla onki virkisfrælsi.

- Tí er ein sanering næstan ein fortreyt fyri eini samanlegging, heldur hann.

Og hann heldur, at danska ríkisveitingin er eitt gylt høvi til tað, tí so ber til at fáa fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum ringast staddu kommununum í rættlag, uttan at nakar annar situr við eini kenslu av, at nakað er tikið frá teimum.

Hann heldur sostatt eisini, at hetta er ein loysn, sum kann forða fyri, at ríkar og fátækar kommunur verða settar upp ímóti hvørjum øðrum.

Men hann leggur samstundis dent á, at verða kommunur saneraðar, eigur kommunala eftirlitið at verða styrkt og tað tað eigur eisini at vera eitt krav, at landsstýrið fær eina neyvari fíggjarstýring av kommununum, so at tær ikki aftur koma sær í óføri.




Hevur tú handilstalent?

– handilslærlingur til Svend Krosstein

**Hevur tú hug til handil, so hava vit pláss fyri einum lærlingi (m/k) í fyritøku okkara.**

Vit bjóða tær eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú verður partur av einum góðum toymi og fært góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár, og til at fáa starvið krevst HH- ella FHS-prógv. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við S & K. Starvið verður sett eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, ert tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum og viðmælum til:

P/F Svend Krosstein
Postboks 3229
FO-110 Tórshavn
Viðm.: Lærupláss

Umsóknarfreistin er 1. juli 2009.

**Meira at vita?**
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Anniku Krosstein, stjóra, tlf. 34 46 02, ella til Jógvan Magnussen, handilsleiðara, tlf. 34 46 16.

*P/F Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning og hevur í løtuni 17 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta HVS-handil í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveiting, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.*

SENDISTOVAN

SK
SVENDKROSSTEIN

Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo